# HEILSANIR

**Góða elskaða Anna**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 26. juni. Jesus pápi signi teg.
**Kærar heilsur omma, abbi, Aksel og Kristina**

**Fitti Rógvi**
Tillukku til tín. Takk fyri at tú altíð er so góður við meg. Eg elski teg
**Ynskir Páll Fríði**



**Góði elskaði Hjalti**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 3 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi teg. Eisini ein heilsan til mammu og babba á hjúnabandsdegnum 31. mai.
**Ynskja vit í Klaksvík**

**Hey góða fitta Silja**
Hjartaliga tillukku við 14 ára degnum í dag. Vit elska teg.
**Mamma, babba, Lisa, Karis og FILIP**


Sosialurin

Heilsanir

kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:

Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

**Góða Silja**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag. Tú ert mín besti vinur
**Gita hvør?**

**Góði fitti Rógvi**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum tann 2. juli, nú ert tú ein stórur drongur. Vit elska teg. Muss og klemm
**Mamma og babba**

# TILTØK

**Gudstænastur**
**4. s. e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 deyvagudstænasta við Jónsvein Bech
***Argja kirkja:*** kl. 11, Sonja Klein
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Heri Joensen
***Kaldbak:*** kl. 12 Bjarni Bæk
***Sørvágur:*** kl 11, Inga Poulsen Dam
***Fuglafjørður:*** kl. 11, Uni Næs
***Hósvík:*** kl. 11, Marjun Bæk
***Skála:*** kl. 11 Jógvan Fríðriksson
***Selatrað:*** kl. 11, Havstein Klein
***Eiði:*** kl. 11 messa, Emil Olsen
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, Esther Hummel. ***Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri føroysku sjómansmissiónina***
***Mikladalur:*** altargangur, kl. 12, Magnus Brahé Jørgensen

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hóskvøldið 28. juni kl. 20 Bíbliutími við Niels J. Nielsen, trúboðara. (1. Kor. 16)
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti við Gullak og Alvildu.
Sunnudagin 1. juli kl. 19 Møti við Ingolf Johannesen, Sandavágur.
Sí annars www.koma.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Einki møti hóskvøldið og sunnukvøldið vegna summarstevnu í Klaksvík.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Hóskvøldið kl. 20 Møti við Oddmar Steinhólm, úr Ísrael.
Sunnudagin kl. 18 Møti við Símun Jacobsen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudagin Møti kl. 11.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti, ungdómurin hevur summarhugna.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Dánial á Dul Jacobsen talar um evnið; »Skálandi« kristin, kl 22 útimøti frammanfyri býráðshúsið.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
http://www.gospel.fo

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti.
Kl. 11.30 samfelagsløta
Kl. 12 Tilbiðjunarmøti.
Undir báðum møtinum er barnaansing fyri børn undir skúlaaldur.
Kl. 12 Sunnudagsskúlin.
Møtini kunna hoyrast beinleiðis á www.livdin.fo

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Sunnudag kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans - Evni: Jóh. ev., kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúlin er í summarfrí, kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Hebron, Argir**
Mikudagin 27. juni kl. 20 Bíbliutími og bønarløta.
Sunnudagin 1. juli kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Jógvan Júst Rasmussen, talar.
Broytingar í vanligu møtitíðunum sunnudagar:
Í summarfrítíðini er eingin sunnudagsskúli og einki møti kl. 12.
Morgunmøti verður longt við uml. 1/2 tíma.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Mikudagin kl. 7 bøn.
Hósdagin kl. 7 bøn, kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 7 bøn.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Eyðun Zachariasen
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.
Mánadagin kl. 7 bøn, kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17 bøn fyri Ísrael og býnum.
Leygardagin kl. 22 Úti-Flare.
Sunnudagin kl. 18 Evanglist møti - (Einki morgunmøti)
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Jerzy Kruk, prestur í Mariukirkjuni. Komandi sunnudag gongur talvan fyri Pæturspeningi.
www.katolsk.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma, Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru vælkomin.

**Møtilýsingar frá samkomuni KEDRON í Sørvági**
***Alt summar frá nú av og fram til sunnudagin 5.8.2007, verður skráin hendan.***
Sunnudagar: Breyðbróting við læru kl. 11.00.
Onki Evangeliskt møti kl. 18.00.
Mikudagar Bønarmøti kl. 20.00.

**Missiónshúsið Libanon í Sørvági**
Stórur útifundur verður sunnudagin kl. 16 á Pálsoyruni. Talarar frá ymiskum pørtum av landinum. Eftir útifundin kl. 18.30 verður skipað fyri einum »syngið við møti« hvar hesi koma at luttaka: Oasubrøðurnir, Eclesia, Hallmar og Rúni Winther, Hanna og Terji Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.